handVERKARIN

2. ÁRSFJÓRÐINGUR 2009 BLAÐ NR. 30 HAVNAR HANDVERKARAFELAG

handverkarin_30_2009.indd 1 2/9/09 15:02:31

Tryggast við fastari flyting

Allir limir, sum ikki eru í eftirstøðu við limagjaldi, eru lívstryggjaðir.

Lívstryggingin er ein umfatandi trygging. Sum dømi kunnu vit her nevna:

- Útgjald við deyða til avvarðandi.
- Útgjald, tá limur gerst 67 ár.
- Útgjald til eina langa rød av hættisligum sjúkum.

Tá børn hjá limi gerast sjúk

Lívstryggingin er eisini galdandi fyri børn hjá limi; tó við teirri avmarking, at tey skulu vera ímillum 6 mánaðir og 18 ára gomul.

Tá børn hjá limi gerast sjúk fevnir tryggingin um hesar sjúkur:

- Eykvæmi, HIV-ígerð av blóðflutningi,
- Nýrasvigna,
- Meningitis,
- Illkynjaðar krabbameinssjúkur,
- Blindni (aldursavmarking: ár >2 og <18)
- Deyvleiki (aldursavmarking: ár >2 og <18)

Umfatandi lívstrygging

Av tí at lívstryggingin er so umfatandi fáa vit ikki nevnt alt her. Men limir kunnu altíð venda sær til skrivstovu felagsins, og fáa ein faldara sendan við nágreiniligari frágreiðing um allar smálutir í lívstryggingini.

Av tí, at tryggingin ikki er galdandi, tá limur er í eftirstøðu, kann hetta fáa sera óhepnar fylgjur.

Tí heita vit á teir limir, sum enn ikki hava stovnað eina sjálvvirkandi flyting, um at fáa tað gjørt. Hetta kann gerast á hendan hátt:

Næstu ferð tygum móttaka rokning fyri mánaðargjald, skulu tygum undirskriva rokningina, lata hana til tygara peningastovn, sum síðani syrgir fyri, at rokningin verður goldin og, at tygum verða tilmeldaður sjálvvirkandi flyting.

Lætt og einfalt. Lívstryggingin er partur av limagjaldinum, sum er 450,- kr. um mánaðin.

Limirnir eru sjálvandi altíð vælkomnir at venda sær til skrivstovuna í hesum sambandi.

Innihald

Egyptaland í 5 túsund ár 3
Heimsins bestu handverkarar 4
Keopspyramidan: Eitt av heimsins undurverkum 6
Hieroglyffur: Eitt áhugavert skriftmál 24

Útgevari: Havnar Handverkarafelag • Stoffalág 60 • Box 203 • 110 Tórshavn
Ábyrgdarblaðstjóri: Eli Brimsvík
Blaðstjórn: Media • **Umbróting og prent:** Gramar
Havnar Handverkarafelag gevur Handverkaran út 4 ferðir um árið.
Skrivstovutíð: Mánadag til og við hósdag frá kl 9 til 15.
Tel. 35 48 00 • Fax 35 48 01 • Teldupostur: handverk@handverk.fo • www.handverk.fo

handverkarin_30_2009.indd 2 2/9/09 15:02:31

Egyptaland í 5 túsund ár

Í ongum øðrum landi fáa vit fylgt søguni so langt aftur í tíðina sum í Egyptalandi. Lutir ið eru 5.000 árar gamlir hava hildið sær líka til dagin í dag. Hetta kemst av tí turra veðurlagnum. Mangir lutir hava ligið undir í sandi, sum hevur varðveitt teir móti at verða oyðilagdir.

Meginparturin av Egyptalandi er oyðimørk. Men Niláin, sum rennur norður ígjøgnum landi ger ein part av landinum til serliga fruktagott lendi. Har er grøðin stór, har vaksa nógvar fruktir og nógv korn verður velt í Egyptalandi.

Niláðin

Niláin rennur úr høgum fjøllum longur suðuri í Afrika. Har regnar øgiligt um summarið, og tí kemur so nógv vatn í Nilánna.

Hetta nógva vatnið fær als ikki verið í ánni. Áin floymir tí yvir bakkarnar, og alt lendið fram við ánni flýtur tí undir í vatni.

Í tríggjar mánaðir fløðir vatnið. So fer at fjara aftur. Men tá ið vatnið fjarar, er jørðin væl væta og sera fruktagóð.

Alt tað vit í dag vita um, hevur Niláin verið grundarlagi undir samfelagnum í Egyptalandi, hóast skiftandi mentanðir; frá tíðini tá ein Farao stýrdi landinum, til í dag nú egyptar flestir hava moamedanska trúgv.



Fløðir og fjarðar

Men tað regnar ikki altíð líka nógv hvørt summar í fjøllunum, haðani Niláin kemur. Tað kemur fyri, at tað regnar so nógv, at Niláin ikki bara floymir oman yvir markirnar, men eisini bústaðarøki. So mugu fólk og fæ búgva í fleiri vikur uppi á fløtu tekjunum. Tað kemur eisini fyri, at tey noyðast at rýma úr húsunum fyri ikki at drukna.

Harímóti kann tað eisini koma fyri, at áin ikki fløðir so nógv summi ár. Tá stendur bert eitt lítið øki av landinum undir í vatni, og tá fáa teir ikki velt so nógv korn, og hungursneyð kann vera í pørtum av Egyptalandi.

Tá egyptar gróvu veitir, fingu teir nógv størri dyrkilendi. Men tað hevur verið eitt stórt og krevjandi arbeiði at grava allar veitirnar. Var eingin Nilá, so var heldur einki Egyptaland. So greitt hava serfrøðingar mangan lýst støðuna hjá hesum meira enn 5000 ára gamla landi. Tí

Heldur fram á síðu 20

handverkarin_30_2009.indd 3 2/9/09 15:02:32

Heimsins bestu handverkarar

Í fornøld vóru 7 bygningsverk vald at vera "heimsins undurverk". Keopspyramidan í Egyptalandi er einasta bygningsverkið av teimum 7, sum enn stendur uppi.

Keopspyramidan, sum er heimsins størsta pyramida, varð bygd av Keops, sum var farao í Egyptalandi um ár 2.560 f.kr.

Keops bygdi pyramiduna í Giza, sum er nakað vestanfyri Keiro. Frammanundan var onki bygt í økinum, sum var oyðumørk.



Umframt stóru pyramiduna bygdi Keops fleiri aðrar bygningar í Giza. Stutt frá pyramiduni bygdi hann stórt tempul, og fleiri drotningapyramidur, til konur sínar. Rundan um stóru pyramiduna bygdi hann ein høgan garð, sum onki er eftir av í dag. Ein stór veit varð grivin úr Nilánni niðan í eitt stórt havnarlag niðan fyri pyramduna. Veit var grivin úr Nilánni niðan í havnarlagið. Teir høvdu stór skip, sum sigldu við farmi, mest gróti, til byggiarbeiðið.

Bygdir vóru eisini bústaðir til teir mongu túsund handverkararnar og arbeiðsfólkini, sum bygdu hesi miklu stórverk. Til arbeiðsmenninar vóru bygdar barakkir, og nakað frá pyramiduni varð bygdur ein býur, við øllum hentleikum, til teir mongu handverkararnar. Tí verri eru rán og tíðarinnar tonn, farin við einum stórum parti av hesum bygningum. Men Keopspyramidan stendur enn trygt og minnir á eina ríka tíð í Egyptalandi.

handverkarin_30_2009.indd 4 2/9/09 15:02:33

Eftirkomarar Keops

Seinni bygdu ein sonur og ein abbasonur Keops eisini stórar pyramidur, vegir og tempul í Giza. Men Keopspyramidan er tann størsta í Giza.

Pyramidurnar hjá synum hansara verða nevndar Kefrenpyramidan og Mykerinospyramidan.

Lat okkum eisini nevna, at Kefren bygdi eina av heimsins størstu høggmyndum í Giza; tað er ein ovurstór leyva við mannahøvdi. Serfrøðingar meta, at andlitið á høggmyndini hevur líkst Kefren.

Pyrmidurnar, leyvuhøggmyndin og aðrir bygningar í Giza teljast í dag millum heimsins mest vitjaðu ferðamál.

Niðanfyri og omanfyri eru myndir av leyvuhøggmyndini, sum Kefren, sonur Keops, bygdi í Giza.

handverkarin_30_2009.indd 5 2/9/09 15:02:34

Keopspyramidan:

Eitt av heimsins undurverkum

Keopspyramidan, uttast høgrumegin, var upprunaliga 146 m. høg

Høggmynd av Keops, sum var farao um ár 2560 f.Kr.

Í dag er skjótt og lætt – við nýmótans tólum - at gera nágreiniligar uppmátingar og staðfesta longd, hædd, hall v.h., tá talan er um eina pyramidu.

Keopspyramidan hevur upprunaliga verið góðar 146 metrar høg; tíðarinnar tonn hevur higartil tikið góðar 9 metrar av upprunaligu hæddini.

So at siga ongin munur hevur verið á síðulongdunum; tær fýra síðurnar hava allar verið um 230,33 metrar til longdar.

Víddin er góðar 54.000 fermetrar; í niðasta lagnum eru lagdir umleið 30.000 steinar, og hallið á teimum 4 síðunum liggur um 51-52°.

210 umfør av gróti eru løgd, og pyramidan er tilsamans góðar 2.700.000 rúmmetrar. Samlaði talið av steinum hevur verið eitt tvey-sifra millióna tal.

Uppmátingar hava víst, at steinarnir í Keopspyramiduni eru so væl lagdir, at teir, sum hava staðið fyri hesum arbeiði, hava dugað matematikk og geometri á høgum stigi.

Mett verður, at tað hevur tikið umleið 20 ár at byggja pyramiduna og, at umleið 230 rúmmetrar eru lagdir hvønn dag. So her er nógv at undrast á.

Nógv at undrast á

Ein av stóru avbjóðingunum, tá ein nýggj pyramida skal byggjast er, at niðastu steinarnir á øllum 4 síðum verða

handverkarin_30_2009.indd 6 2/9/09 15:02:35

Nærmynd av Keopspyramiduni.

lagdir vatnrætt og í somu hædd. Tað sama er galdandi fyri hvørt umfar, sum lagt verður.

Møguliga hava egyptar grivið veitir – innanfyri ella uttanfyri har, sum fyrstu steinarnir skuldu liggja – og so fylt vatn í veitirnar. Tá hevur verið møguligt at leggja fyrstu steinarnar – á øllum síðum – vatnrætt og í somu hædd. Tað undrar kortini mong, at egyptar – fyri 4.500 árum síðani – megnaðu at byggja so stórar pyramidur. Lat okkum eisini nevna, at enn eru mong, sum halda, at hægri maktir hava verið uppi í leikinum, tá Keopspyramidan varð bygd. Tað er so upp til lesaran at taka støðu til.

2,3 milliónir av kálksteini

Av teimum 210 umførunum, sum vóru løgd, tá ið pyramidan varð bygd, eru í dag 201 eftir. Nógv tann stórsti parturin av pyramiduni er úr rættuliga **bleytum kálksteini**, sum er tikin úr grótbroti stutt frá pyramiduni.

Bleytu kálksteinarnir hava, so at siga allir, verið um 0,52 metur høgir. Teir niðastu eru størstir, umleið 1,5 rúmmetur. Meðalvektin liggur um 2,5 tons, og mett verður, at tá ið pyramidan var liðug, vóru bleytu kálksteinarnir um 2,3 mió. í tali.

Hvør einasti steinur hevur eitt skap sum ger, at hann neyvt hóskar til har hann er lagdur. Egyptar brúktu eisini mørtil, sum teir gjørdu úr gipsi, kálkmjøli, sandi og granittgrúsi.

Hvítir kálksteinar

Keopspyramidan hevur verið klødd við hvítum kálksteinum, sum eru tiknir úr einum øki norðanfyri Giza, ið verður nevnt Tura. Hesir steinar verða tí eisini nevndir *turakálksteinar.* Teir hava verið eitt sætt prýði fyri pyramiduna, men eru tí verri teir flestu stjolnir. Nakrir fáir Turakálksteinar eru eftir niðast. Teir eru nógv ljósari og nógv harðari enn bleytu kálksteinarnir, sum eru úr námum stutt frá pyramiduni.

handverkarin_30_2009.indd 7 2/9/09 15:02:36

Keopspyramidan: Núverandi inngongd, sum er í 16 metra hædd.

Tað hevur verið sagt, at toppurin upprunaliga var prýddur við gulli. Hetta er helst ikki rætt; í dag verður mett, at Keopspyramidan hevur verið svørt í erva. Serfrøðingar meta, at pyramidan hevur verið klødd við svørtum diorit steini í erva. Hetta hóskar eisini væl til átrúnaðin hjá egyptum, sum trúðu, at alt var og verður skapt úr svørtum.

Inni í Keopspyramiduni

Upprunaliga høvuðsinngongdin hevur verið væl omanfyri núverandi inngongd, sum er í 16 metra hædd (Nr. 1).

Úr høvuðsinngongdin verður komið inn í eina langa gongd, sum gongur niðureftir við einum halli, sum er 26°. Haðani koma vit niður í eina vatnrætta gongd, sum er 9 metur long. Tá eru vit 30 metur undir jørð.

Har er eitt rúm (Nr. 2), sum kanska ongantíð er gjørt liðugt. Tað er ikki lætt at siga, hvat hetta rúmið hevur verið ætlað til. Onkur hevur mett, at talan er um eitt gravkamar, meðan onnur halda uppá, at rúmið skuldi røkja sambandi millum farao og undirheimin.

Úr hesum rúmi er ein 16,5 metrar long gongd suðureftir, sum helst eisini onkursvegna hevur samband við átrúna.

Ovari parturin

Góðar 28 metrar niðanfyri høvuðsinngongdina, byrjar ein gongd, sum gongur upp í pyramiduna. Í henni møtast tvær leiðir; onnur gongur vatnrætt – 38 metrar – inn í Drotningakamrið (Nr. 3).

Hin gongur ígjøgnum sonevnda Gallaríið (Nr. 4) upp í Kongskamarið (Nr. 5). Gallaríið er knappar 47 metrar langt og 8,6 metrar høgt.

Drotningakamarið er knappar 6 metrar langt, góðar 5 metur breitt og 6,2 metur høgt. Navnið á rúminum hevur ikki samband við ávísa drotning. Tað sigst, at arabar, sum høgdu seg inn í rúmið um ár 900, funnu uppá navnið.

Veggir og loft í Gallarínum og Drotningakamarinum eru úr granitti.



1. Inngongdin í Keopspyramiduna, 2. Niðasta rúmið, ið kanska ongantíð varð gjørt liðugt, 3. Drotningakamarið, 4. Gongd upp í kongskamarið, 5. Kongskamarið.

handverkarin_30_2009.indd 8 2/9/09 15:02:37



Kongsgravkamarið er ovasta rúmið í pyramiduni. Her er Keops – væl balsameraður – lagdur í sarkufakið, sum er einasti lutur, ið ránsmenn ikki hava tikið.

Kongskamarið

Kongskamarið, sum er ovasta rúmið, er knappar 11 metrar langt, góðar 5 m. breitt og 5,9 metrar høgt. Í loftinum eru 9 stórir granittsteinar, sum eru mettir at viga millum 25 og 50 tons hvør. Omanfyri teir eru 5 smærri rúm; tað ovasta av hesum hevur loft við reising. Henda reising ber stóra trýstið úr erva niður á kongskamarið.

Veggirnir í Kongskamarinum eru allir úr granitti.

Í flestu pyramidum er – við hiereglyfum - greitt frá, hvør hevur bygt og, hvør er jarðaður í pyramiduni. Hóast nógv er leitað so er "Keops-navnið" bara funnið í tveimum av smáu rúmunum omanfyri loftið í Kongskamarinum.

Einasti leysi luturin, sum er eftir í Keopspyramiduni er eitt sarkofag úr granitti. Í hesum hevur Keops – væl balsameraður - ligið í kistu. Og tað er onki at ivast í, at nógvir dýrgripir eru settir í Kongskamarið; men teir eru allir rændir, helst fyri fleiri túsund árum síðani.

Umframt tey rúm og gongdir, sum nú eru nevnd, eru fleiri tunellir og smærri rúm, sum eisini hava haft ein átrúnaðarligan leiklut.

Óvissan um Keops

Av tí at Keopspyramidan er tann størsta í heiminum, so er Keops vorðin eitt tað kendasta navnið í egyptiska søgu. Tí kann tað tykjast løgið, at serfrøðingar ikki eru samdir um, hvat ár hann varð føddur, nær hann gjørdist farao og, hvussu mong ár hann sat við valdinum.

Lat okkum her nevna, at í einum týðandi skjali verður sagt, at Keops var farao í 23 ár. Her eigur eisini at vera nevnt, at í dag er rættuliga



Gallaríið, sum gongur upp í Kongskamarið, er laðað við granittsteini.

handverkarin_30_2009.indd 9 2/9/09 15:02:39

Í miðjuni er Mykerinos, ið var abbasonur Keops, bygdi Mykerinospyramiduna.

vanlig hugsan, at Keopspyramidan er bygd um ár 2.560 f.kr. Sambært hesum er pyramidan í dag umleið 4.500 ára gomul.

Søgufrøðingar

Fyri ikki so nógvum árum síðani var mett, at tað tók um 30-40 ár at byggja Keopspyramiduna. Men flestu forn- og søgufrøðingar í dag meta, at Keops ikki kann hava sitið so longi við valdinum, og at tað tí ikki kann hava tikið so langa tíð at byggja pyramiduna.

Flestu serfrøðingar meta, at Keops hevur verið farao í Egyptalandi í góð 20 ár, og at tað hevur tikið góð 20 ár at byggja pyramiduna.

Siga vit, at tað tók góð 20 ár at byggja Keopspyramiduna, so vóru fleiri túsund steinar lagdir hvønn dag. Bara í niðasta lagnum eru lagdir umleið 30.000 steinar.

Væl skipað

Hava egyptar bygt Keopspyramiduna eftir 20 árum, so hava teir duga sera væl at samskipa eitt stórt tal av arbeiðsfólki hesi árini.

Serfrøðingar eru ikki allir samdir um, hvussu nógv fólk hava verið í arbeiði við Keopspyramiduna, men fleiri metingar siga, at talið hevur verið omanfyri 80.000 og møguliga 100.000.

Tá metast skal um, hvussu langa tíð tað hevur tikið at byggja pyramiduna og, hvussu nógv fólk hava tikið lut í arbeiðinum, so er neyðugt eisini at hugsa um, at tað hava verið tríggjar høvuðsuppgávur:

1) Arbeiði í grótbrotum og námum har grótið er høgt.
2) Flutningur av gróti til pyramiduna.
3) Byggiarbeiðið: Arbeiðið á staðnum har pyramidan er bygd.

Herodot úr Grikkalandi

Ein kendur søgufrøðingur úr Grikkalandi, sum var og ferðaðist í Egyptalandi millum ár 449 og ár 430 e.kr. skrivar í eini drúgvari frágreiðing um egyptiska søgu, at Keops var farao í Egypta-

Egyptar vóru royndir fiskimenn.

handverkarin_30_2009.indd 10 2/9/09 15:02:41

landi í 50 ár. Herodot skrivar eisini, at tað tók 20 ár at byggja Keopspyramiduna.

Hann skrivar m.a. soleiðis um Keops: ".. Tá Keops gjørdist kongur, rendi hann landið út í stóra armóð. Hann lat aftur allar halgidómar, og noktaði fólkinum at ofra til gudarnar. Síðani noyddi hann allar egyptar at arbeiða fyri seg. Hann álegði teimum at sleipa grót úr grótbrotunum í arabiskum fjøllum til Nilánna.

Herodot skrivar eisini, at "teir arbeiddu uppá skift, 100.000 mans hvørja ferð, í tríggjar mánaðir. Við hørðum arbeiði tók tað fólkinum tíggju ár at gera vegin til staðin, har pyramidan skuldi byggjast. Harumframt tók tað 20 ár at byggja pyramiduna."

Í dag meta søgufrøðingar ikki, at øll frágreiðingin hjá Herodot er eftirfarandi, men treyðugt so – helst er okkurt ikki uppspunnið.



Fleiri túsund handverkarar hava arbeitt í 20 ár við at byggja pyramiduna.

Fleiri sløg av gróti

Í Keopspyramiduni eru fleiri sløg av gróti. Meginparturin er bleytur kálksteinur, sum er fingin úr námum stutt frá pyramiduni. Hetta slagið av kálksteini er so mikið bleytt, at teir hava fingið høgt og sagað tað sundur við amboðum úr kopari.

Tað er onki at ivast í, at teir høvdu tekningar at arbeiða eftir í námunum. Lidnu steinarnar hava teir drigið á sletum úr náminum til pyramiduna.

Tað liggur rættuliga fast, at teir ikki brúktu vognar við hjólum, og teir hava heldur ikki brúkt djór at draga við. Tí kunnu vit siga, at teir høvdu ikki annað enn hendur og kropp at arbeiða við.

Í hesum tíðarskeiði kendu egyptar ikki jarn, og tí hava teir ikki haft amboð úr jarni, tá teir bygdu Keopspyramiduna. Men teir høvdu ríkiligt av kopari, og hava tí haft koparmeitlar at kíla grótið sundur við, og sagir við koparbløðum.

Teir uttastu kálsteinarnir (sum so at siga allir eru stolnir, vóru úr námum í Tura; har gjørdu egyptar stórar tunlar langt niður í lendið, sum enn eru at síggja. Tað eru hesir steinar, sum verða nevndir Turakálksteinar.

Inni í pyramiduni eru fleiri rúm og gongir, sum hava loft og veggir úr granitti.

Granitt, sum er nógv harðari enn kálksteinur, tóku teir úr námum í Aswan. Frástøðan millum Giza og Aswan er umleið 800 kilometrar.

Amboðini vóru úr kopari, og tí er ikki heilt greitt, hvussu teir hava fingið sagað og høgt granitt sundur. Tað hevur verið nevnt, at teir møguliga brúktu turkaðar trækílar, sum teir slerdu inn í rivur og síðani oystu vatn á. Tá ið turru trækílarnir gerast vátir vaksa teir so mikið nógv, at teir kunnu spreingja hart grót sundur. Hetta er kortini enn eitt ivamál.

Teir størstu granittsteinarnir í Keopspyramiduni viga ikki minni enn 50 tons.

Flutningur og flutningsamboð

Egyptar bygdu skip, sum burturav vóru brúkt til grótflutning. Við Nilánna var hópur av um- og uppskipingarhavnum. Skip sigldu í fastari rutu millum havnir nærhendis námunum, og

handverkarin_30_2009.indd 11 2/9/09 15:02:42



Meidum pyramidan er eitt dømi um at tað ikki er bara sum at siga tað, at byggja eina pyramidu. Ytsta lagið á pyramiduni er niðurbrotið av tíðarinnar tonn. Henda pyramida er væl eldri enn Keopspyramidan.

uppskipingarhavnina, sum var gjørd við Giza. Frá uppskipingarhavnini í Giza til Keopspyramiduna var ein ovurstór breyt, sum var gjørd til at draga sledur eftir. Sledurnar vóru nógvar í tali; helst fleiri 1000.

Fyri at lætta um arbeiðið við sledunum løgdu teir lunnar undir, sum teir smurdu við olju; tá var nógv lættari at draga sledurnar.

Í hesum tíðarskeiði var Niláin brúkt til so at siga allan flutning suður og norður ígjøgnum landi. Ongin brúgv var um Nilánna, og tí kunnu vit siga, at áin virkaði sum ein ringvegur í Egyptalandi.

Niláin og bøndur

Í tíðarskeiðnum juli/september fór Niláin – á hvørjum árið – um áarbakkarnar, og floymdi inn á markirnar har bøndurnir høvdu sátt sína grøði. Tí vóru bøndurnir at kalla arbeiðsleysir í tríggjar mánaðir á hvørjum ári. Ella rættari sagt – teir vóru tøk arbeiðsmegi, sum farao hevði stóran tørv á, ikki minst, tá vit hugsa um sera krevjandi og umfatandi arbeiði, sum var at gera við stóru pyramiduna í Giza. Umframt pyramiduna, sum hann bygdi til sín sjálvs, bygdi Keops eisini stórt tempul, tríggjar smærri pyramidur til konur sínar, íbúðir til arbeiðsfólki og fleiri aðrar bygningar í Giza.

Hesin báturin varð funnin í eini bátagrøv við Keopspyramiduna. Tað sigur, at bátar og skip hava havt stóran týdning, tá ið Keops livdi.

handverkarin_30_2009.indd 12 2/9/09 15:02:42

Farao var ein gudur

Lat okkum her nevna, at í hesum árum var virðingin fyri farao ovurstór. Tað er onki at ivast í, at bøndurnir sóu farao sum ein gud, sum teir fegnir vildu hjálpa og tæna. Teirra trúgv var sera einføld; teir ivaðust ikki í, at um teir hjálptu farao, so fór hann at hjálpa teimum, tá teirra lív í hesum heimi var at enda komið. Tað hevur ikki borið til, at bygt Keopspyramiduna, uttan hjálp frá bøndrunum.

Somuleiðis verður mett, at tað ikki hevur borið til, at bygt eitt slíkt verk við trælum. Hetta arbeiði kravdi, at hvør smálutur var lagdur væl til rættis, og at alt, sum var planlagt varð hildið. Tí kravdi hetta arbeiði góða og stabila arbeiðsmegi, og kann tí undir ongum umstøðum vera trælaverk.

Barakkir

Fornfrøðiligar kanningar hava prógvað, at eitt stórt tal av barakkum vóru bygdar stutt frá pyramiduni. Mett verður, at í hesum barakkum búði alt tað vanliga arbeiðsfólkið.

Í hvørji barakk vóru 91 rúm, sum vóru um 27 x 3 m. Í eini slíkari barakk búðu umleið 4.000 mans.

Roknað verður við, at teir, sum búðu í barakkunum komu og fóru; teir vóru helst vanligir bøndur, sum arbeiddu eitt avmarkað tíðarskeið við pyramiduna.

Nógvir handverkarar

Rannsóknir hava vístast, at stutt frá pyramiduni, hevur eisini verið ein rættuliga stór bygd. Har hevur eitt stórt tal av handverkarum – við húski – búleikast. Og serfrøðingar meta, at har hava búð nógv ymisk sløg av handverkarum. Talan hevur verið um t.d. serkønar grótsmiðir, múrarar, koparsmiðir, silvursmiðir, gullsmiðir, timburmenn, snikkarar, skipasmiðir, kokkar, bryggjarar, bakarar, slagtarar, gartnarar, skómakarar, myndahøggarar, listamenn, arkitektar, verkfrøðingar og arbeiðsformenn.

Orðið mumia er upprunaliga úr arabiskum og merkir lík varðveitt við harpiksi. Innvølirnir vóru tiknir úr likaminum, so varð líkið vaska í kryddurtum og pálmavíni, og smurt við natron og lagt at turka. Fyri at fáa upprunaliga skapilsi aftur, so var tað smurt við harpiksi, sum vardi fyri vatni, Sa varð mumian vavd inn í løriftsálir og løgd í kistu ella sarkofag. Tey kongaligu vóru oftast løgd í fleiri kistur, sum ein russisk babuska.

Og nógv tey flestu hava havt fastan bústað í bygdini eitt langt tíðarskeið. Har hava tey búleikast og arbeitt til pyramidan var liðugt, ella so leingi brúk hevur verið fyri handverkarum.

Í hesum sambandi eigur eisini at vera hugsað um, at stóra talið av fólki, sum hevur verið knýtt at arbeiðinum við pyramiduna, hevur fingið føði og klæði hvønn dag eftir fastari skipan.

At útvega fleiri túsund fólkum føði og klæði – í so mong ár – hevur ikki verið minni krevjandi enn sjálvt byggiarbeiði.

handverkarin_30_2009.indd 13 2/9/09 15:02:43

Tá best stóð til í Egyptalandi ráddu teir yvir meginpartinum av Miðeystri, heilt vestur til Irak. Á myndini er hálovan og frágreiðing um ein bardaga skrivað við hieroglyfum. Myndin er nógv yngri enn Keopspyrmidan. Tá Keops livdi vóru teir ikki farnir at brúka hjól.

Trúgvin fyri 4.500 árum síðani

Tað eru mong, sum spyrja, hví egyptar bygdu hesi ovurstóru bygningsverk, sum pyramidurnar eru. Fyri at svara tí spurninginum mugu siga nøkur orð um trúgv teirra.

Egyptar trúðu, at farao var guddómligur og, at hann var bindilið millum menniskju og gudarnar. Tá ein farao doyði fór sál hansara undir eina ferð av jørðini til gudarnar. Men sál teirra var so tætt knýtt at likaminum, at syndraðist likamið, so var vandi fyri at sál hansara eisini syndraðist. Tað var orsøkin til, at teir balsameraðu tey deyðu; fyrst og fremst máttmiklar kongar og drotningar. Tey vóru løgd í væl vardar gravir – saman við stórari nøgd av ríkidømi, sum hevði verið teimum kært, tá ið tey livdu sítt foldarlív. Egyptar trúðu, at hesir lutir fóru at fáa stóran týdning eftir deyðan. Og fyri, at ongin skuldi órógva kongsgrøvina bygdu teir stórar pyramidur. Hesar pyramidur vóru so væl bygdar, at ongin roknaði við, at tað fór at bera til at bróta inn í pyramidurnar og órógva ella stjala tað, sum har var lagt. Men soleiðis skuldi ikki ganga.

Í dag vita vit, at ránsmenn – fyri fleiri túsund árum síðani – megnaðu at bróta seg inn í pyramidurnar, og stjala alt, sum var vert at stjala. Pyramidurnar eru nógvar í tali og eru allar væl kannaðar í nýggjari tíð, men tí verri kunnu vit ikki siga, at nógvir lutir eru funnir í pyramidunum.

Ættarbond

Tær tríggjar stóru pyramidurnar í Giza eru gott dømi um, hvussu hjúnarbondini ofta vóru í gamla Egyptalandi. Fyrst er at nevna, at Keops hevði tríggjar konur. Fyrsta konan var systur hansara Meritites. Saman áttu tey tvey børn, eina gentu og ein drong; Hetepheres og Kawab. Tær tríggjar konur Keops eru jarðaðar í trimum

handverkarin_30_2009.indd 14 2/9/09 15:02:44

Egyptar vóru eisini handilsmenn, og sigldu langar leiðir eftir vørum. Av tí, at trø ikki vaksa í Egyptalandi vóru teir noyddir at innflyta træ, m.a. úr Libanon. Teir sigldu eisini til onnur lond við vørum, sum teir sjálvir tilvirkaðu.

lítlum pyramidum, sum standa stutt frá Keopspyramiduni.

Keops átti sonin Kefren við triðju konu síni.

Kefren (krýndur farao 2.558 f.kr.) hevði minst tvær konur. Tann fyrra, Meresankh var abbadóttir Keops; dóttir Hetepheres og Kawab, ið vóru syskin.

Við seinnu konu síni átti Kefren sonin Mykerinos, ið gjørdist farao eftir Kefren.

Um mátieindina Cubit

Tá ið egyptar bygdu pyramidurnar brúktu teir eina mátieind, sum verður nevnd The Royal Cubit.

Tann, sum í dag er mest kendur fyri gransking í gomlu mátieindini í Egyptalandi er bretin Flinders Petrie (1853-1942). Hann brúkti ikki minni enn tvey ár av sínum lívi til at fáa greiðu á hesum spurningi. Hann kannaði serliga Keopspyramiduna, og kom eftir, at ein cubit var ein armslongd, frá alboganum út í strekta longutong. Hendan longdin er, tá talan er religiøs viðurskifti býtt í 7 eindir (handsbreiddir) og ein handsbreidd svarar til 4 fingrar. Soleiðis verður ein cubit tað sama sum 28 fingrar.

Verður ein cubit samanborin við ein metur liggur hon ímillum 0,5236 og 0,5237 m.

Hetta minnir ikki sørt um mátieindina, sum enn hoyrist á mannamunni í Føroyum: ein alin, ein fótur og ein tummi. Grundarlagið undir báðum eindunum er funnið í likaminum.

Eitt heimsveldi

Keops, sum læt byggja heimsins størstu pyramidu, var sonur Snorfu, sum varð krýndur til farao um ár 2.575 f.kr.

Í dag vita vit meira um stjórnartíðina hjá

handverkarin_30_2009.indd 15 2/9/09 15:02:45



Fornfrøðingar hava grivið út ein heilan bý, sum einans handverkarar hava búð í.

Snorfu enn vit vita um tíðina, tá sonur hansara hevði valdið í Egyptalandi. Men ongin ivi er um, at Egyptaland var mætasta ríki í heiminum, tá Keops gjørdist farao.

Undir Snorfu var nógv virksemi í landinum. Stjórnartíð hansara verður í dag mett at vera ein tann mætasta í egyptiskari søgu. Hann er eisini kendur fyri at seta í verk stórar samfelagsligar og mentunarligar broytingar í landinum.

Kríggj og herferðir

Snorfu legði dent á at hava sterka hermegi undir sær, og í stjórnartíð hansara vóru fleiri stórar og týðandi herferðir gjørdar. Í dag vita vit t.d. um eina stóra herferð hann gjørdi inn í Nubia, sum grannalandið sunnanfyri Egyptaland nevndist. Søgan veit at siga, at í hesi herferð vóru 7000 mans tiknir fangar, og fluttir til Egyptaland, har stórur tørvur var á arbeiðsmegi.

Snorfu sendi eisini herdeildir til Libya, og var ofta í bardaga við nomadar, sum livdu nærhendis Egyptalandi.

Kongsborgir, tempul og pyramidur

Grundarlagi undir egyptiska kongshúsinum vóru tey nógvu stóru góðsini, sum farao hevði undir sær. Eftir stuttari tíð setti Snorfu á stovn 35 nýggj góðs í Egyptalandi.

Hetta gjørdi, at hann kundi seta í verk stórar byggiverkætlanir. Snorfu lat byggja eitt stórt tal av kongsborgum, templum og ikki minni enn tríggjar stórar pyramidur.

Arbeiðsmenn og handverkarar

Í hesum sambandi var neyðugt at hava eitt stór tal av fólki í arbeiði. Talan var um arbeiðsmenn, handverkarar, arkitektar, verkfrøðingum og serfrøðingar av nógvum ymiskum slagi. Og tí var sjálvandi eisini stórur tørvur á vørum og tilfari av ymsum slagi.

Í Egyptalandi var t.d. ongin skógur, og tí var neyðugt at innflyta timbur, sum tørvur var á í

handverkarin_30_2009.indd 16 2/9/09 15:02:47

landinum. Egyptar høvdu gott handilssamband við tey lond, sum seldu vørur, ið tørvur var á í Egyptalandi. Teir høvdu skip, sum sigldu í Miðjarðarhavinum, og kundu tí eisini hava handilssamband við rættuliga fjarskotin lond, sum t.d. Libanon. Í hesum sambandi kundu vit nevnt, at eitt árið komu ikki minni enn 40 stór skip úr Libanon til Egyptalands við timbri, mest sedertræ.

Stórur tørvur var eisini á kopari, sum egyptar brúktu til amboð av ymiskum slag. Tí hevði Egyptaland eisini stór áhugamál í Sinai; har var m.a. nógv kopar, turkis og aðrar vørur, sum tørvur var á í Egyptalandi.

Handverkarar

Á døgum Farao høvdu handverkararnir í Egyptalandi stóran týdning.

Teir arbeiddu nógv saman, og gjørdu nógvar hugtakandi vakrar lutir og sonn listaverk. Teir gjørdu standmyndir, sera hegnisligar møblar og brúkslutir, og teir gjørdu framúrskarandi verk úr mongum ymiskum grótsløgum.

Handverkararnir vóru í stóran mun listamenn, serliga tá hugsað verður um allar teir vøkru lutirnar teir gjørdu úr gulli, sum prýddu borgir, tempul, pyramidir og húsini hjá ríka partinum av fólkinum.

Aðrir handverkarar bygdu skip, gjørdu lutir úr leðri og skinni. Somuleiðis gjørdu teir krevjandi togverksarbeiði og segl til skipini sum høvdu stóran týdning í samfelagnum

Teir arbeiddu við ymiskum steinsløgum, eisini við gimsteinum, gulli og kopari, sum nógv var til av í Egyptalandi

Kvinnurnar vóru eisini handverkarar; tær spunnu og vóvu alt, sum klæðini vóru virkaði úr. Fínastu klæðini vóru á høgum góðskustigi tey kundu vera so fín at tey nærmast vóru gjøgnumskygd.

Ferðamannaland

Eins og í dag, vitjaðu ferðafólk fyri fleiri túsund árum síðani lond og ferðamál, sum á einhvønn hátt vóru serliga áhugaverd og hugtakandi. Teirra millum vóru rithøvundar úr Grikkalandi og Italia, sum skrivaðu um, hvar teir ferðaðust og, hvat teir mettu vera serliga hugtakandi og áhugavert. Tað vóru hesir rithøvundar, sum skaptu hugtakið "Heimsins 7 undurverk". Av teimum 7 undurverkunum, sum teir skrivaðu um, hevur tíðarinnar tonn beint fyri 6. Undurverkið, sum eftir stendur, er heimsins størsta pyramida, sum Keops farao læt byggja í Egyptalandi fyri meira enn 4500 árum síðani.

Ein vitjan í forna Egyptalandi

Hetta er ein hugsað frásøgn, sum á ein livandi hátt greiðir frá eini vitjan í einum býi og

Í hesum modellinum síggja vit Keopspyramiduna við garði rundanum, tempul og longu breytini, ið varð gjørd oman í havnarlagið. Rúm eru eisini at síggja inni í pyramiduni

handverkarin_30_2009.indd 17 2/9/09 15:02:48



Serfrøðingar meta, at grótið, ið pyramidurnar eru bygdar av, er drigið á sletum eftir eini rampu, sum er hækkað hvørja ferð eitt umfar er lagt afturat.

lívinum har í forna Egyptalandi fyri meira enn 4000 árum síðani: Tey fara fyrst yvir í tær gøturnar, har handverkararnir búgva. Í einari gøtu búgva allir pottasmiðirnir, í einari aðrari gøtu búgva allir snikkararnir. Steinsmiðir, koparsmiðir, skómiðir og allir hinir handverkararnir hava eisini hvør sína gøtu.

Hygg hasar stásiligu krukkurnar har, rópar Mut. Eina sovorðna skuldu vit keypt.

Handan man vera alt ov dýr. Hatta eru ikki leirkrukkur, sum pottasmiðirnir hava gjørt. Hasar eru høgdar úr steini. Tann hvíta, ið tit næstan síggja ljósið skína ígjøgnum, er úr alabast. Tað er ógvuliga dýrt. Hasar krukkurnar eru fyri rík fólk og ikki fyri okkum. Tíverri, tí tær brotna ikki so lætt sum leirkrukkurnar.

Í einari av gøtunum er ein ræðuligur gangur. Har búgva koparsmiðirnir. Ein maður stendur og bukar eina stóra koparplátu, so hon verður skapað sum eitt fat.

Nakrir aðrir menn fást við at stoypa øksir og knívar. Teir hava smeltað koparið í eina leirskál. Tað sjóðar og rýkur, tá ið teir stoyta tað flótandi metalið í stoypiformarnar.

Tá er meira friðarligt í gøtunum, har skósmiðirnir sita og seyma sandalir úr leðri, og har sum bakarin eltir deiggj at baka breyð av.

Templið

Úr teimum trongu gøtunum koma tey út á ein breiðan veg. Her er púra kvirt. Hetta er hin heilagi vegurin, ið gongur niðan til templið.

Tað liggur fyri endanum á vegnum við einum høgum garði rundanum.

Tey ganga niðan ímóti templinum. Báðumegin vegin standa standmyndir. Tað eru heilag dýr, ið skulu verja vegin til húsið hjá gudinum.

Frammanfyri templið steðga tey. Her er eitt portur á múrinum við einum høgum torni hvørjumegin. Í tornmúrinum eru høgdar myndir og innskriftir.

Hvat stendur har á múrinum? Tað veit eg ikki rættuliga, eg havi ongantíð lært at lesa. Tað duga bert tey lærdu fólkini, skrivararnir og slík.

Gjøgnum tað breiða portrið kaga tey inn í tempulgarðin.

Sum her er fínt, sigur Ami og hyggur at teimum longu røðunum av súlum báðumegin í garðinum. Á súlunum eru myndir málaðar og skrifttekn í føgrum litum. Skulu vit ikki fara inn í húsið, spyr Mut.

Nei, har sleppa vit ikki inn, hatta er eitt heilagt hús, har bert prestar sleppa inn í. Har inni býr gudurin hjá Memfis, Ptah, saman við

Framhald á síðu 20

Ein gongd inni í Mykerinospyramiduni

handverkarin_30_2009.indd 18 2/9/09 15:02:48

handverkarin_30_2009.indd 19 2/9/09 15:02:49

konu og soni.

Inni í tí allarheilagasta rúminum stendur gudsmynd hansara. Har inni tænir presturin honum. Ongi vanlig fólk sleppa at síggja tað. Men eg havi hoyrt, at hann vaskar gudinum, smyr hann, og gevur honum mat og drekka. So verður gudurin Ptah glaður og vil fegin hjálpa øllum í Memfis. Hann er ein sera mætur gudur. Hann var til, áðrenn allir hinir gudarnir. Saman við einum øðrum gudi hevur hann skapað allar lutir á jørðini og gjørt av, hvussu teir skulu síggja úr.

Framhald av síðu 3

var neyðugt at fólki, ið har búði arbeiddi saman. Hetta var eisini orsøkin til at Egyptaland var savna til eitt stórt ríki, longu áðrenn steinøld var í Norðurlondum.

Langt áðrenn fólk komu at búgva í Norðurlondum hava fólk búð fram við áarbakkanum við Nilánna.

Í dag verður roknað við, at tað hendi fyri meira enn fimm túsund árum síðani.

Dynasti

Egyptisk søga verður býtt upp í 19 tíðarskeið, sum teir nevna dynasti:

Fyrsta og annað dynasti: (2575-2134 f.Kr.)

Gamla ríki: 3.-6. dynasti (2134-2.040 f.Kr.)

Millumtíðarskeiðið: 12.-14. dynasti (2040-1640 f.Kr.)

Nýggja ríkið: 18.-19. dynasti (1.550-1.070 f.Kr.)

Keops, sum bygdi heimsins størstu pyramidu livdi í 4. dynasti, sum byrjar um ár 2.134 f.kr. og endar um 2.040 F.kr.



SPEKT løggildir grannskoðarar Spf.
spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

Staravegur 17 · Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn
Tel 34 34 34 · Faks 34 34 35

SPEKT

løggildir grannskoðarar

handverkarin_30_2009.indd 20 2/9/09 15:02:50

Ein depil innan skipatænastur

www.mest.fo

At smíðja, umvæla og umbyggja skip og verksmiðjur er okkara avbjóðing.

Men **MEST** er eisini so nógv annað.

Vit bjóða m.a.

- Serkøn fólk og vælútgjørdar smiðjur
- Landsins størstu goymslu av eykalutum
- Projekt- og teknistovuarbeiði
- Stórar bedingar og turrdokk
- Leigu av sleipibátum og kranum
- Titringsmátingar (vibratiónsanalysur)

MEST

MEST
P.O. Box 65
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 30 11 00
Fax +298 30 11 01
info@mest.fo
www.mest.fo

Vegurin Langi · Postboks 3309
FO-110 Tórshavn · tel 345 000
fax 345 001 · www.balslev.fo
balslev@balslev.fo

BYGMA
BALSLEV

handverkarin_30_2009.indd 21 2/9/09 15:02:50

Inventar Tænastan

www.inventar.fo - Tel. 353800

Eitt trygt grundarlag

Articon hevur serligan førleika innan jørð-, kloakk-, betongarbeiði, byggibúgving, vega- og havnagerð, fjarhita, timbur- og snikkaraarbeiði eins og ymisk apteringsarbeiði, tá skip verða bygd ella umvæld. Men vit kunnu standa fyri ella vera partur av so at siga øllum verkætlanum ella byggiarbeiði so sum skrivstovubygningar, verksmiðjubygningar, goymsluhallir, umvæling og umbygging.

ARTICON

Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · articon@articon.fo · www.articon.fo

handverkarin_30_2009.indd 22 2/9/09 15:02:52



FØROYABANKI

Nýggj kundatænasta á telefon 330 330

Kundatænastan er títt beinleiðis samband við bankan, har vit veita tær tænastur skjótt, greitt og uttan umstilling.

Í Kundatænastuni fært tú altíð samband við bankafólk, ið er til reiðar at avgreiða tíni ørindi skjótt og greitt. Tær nýtist sostatt ikki at bíða eftir tínum ráðgeva. Um tú hevur ørindi, ið krevja ráðgeving, stilla vit teg sjálvandi um.

SENDISTOVAN

www.foroya.fo

handverkarin_30_2009.indd 23 2/9/09 15:02:52

Hieroglyffir:

Eitt áhugavert skriftmál

Hieroglyffurnar eru heimsins næstelsta skriftmál. Í forna Egyptalandi vóru hieroglyffurnar vanligar í skrivligum samskifti á øllum økjum fram til u.l. ár 394 e.kr. Tá missa tær sín grundleggjandi týdning. Mett verður, at kunnleikin at lesa og skriva hetta mál livdi fram ímóti miðøldini. Tá gjørdist arabiskt mál vanligt í Egyptalandi, og kunnleikin at lesa og skriva hieroglyffur fór til grundar. Ongin var nú førur fyri t.d. at lesa tað, sum var skrivað á mangar 1000 varðveittar pappírsrullur, sum greiða frá egyptiskari søgu og mentan. Egyptar høvdu eisini í fleiri túsund ár skrivað á t.d. leirtalvur, tekningar, málningar, standmyndir og veggir í gravstaðum.

Rosettasteinurin, sum ein soldátur hjá Napoleon Bonaparta fann og tók við sær heim til Fraklands.

Jean Francois Champollion: Hann brúkti tekstin á Rosettasteininum, tá ið hann lærdi seg at lesa hieroglyffir.

Av hesi gongd var kunnleikin til forna egyptiska søgu og mentan eisini farin í gloymskunnar hav.

Napoleon Bonaparta

Ein tilvildarlig hending í august 1799 kom kortini at broyta alt hetta. Tilvildarliga hendingin hevði samband við, at Napoleon Bonaparta í 1798-99 var á herferð í Egyptalandi. Ein av hermonnum hansara kom í august 1799 fram á ein stein, sum hann helt vera so mikið áhugaverdan, at hann tók hann við sær til Fraklands.

Tá málfrøðingar kannaðu steinin komu

handverkarin_30_2009.indd 24 2/9/09 15:02:53



Her er ein tekstur, sum er skrivaður við hieroglyffum.

teir eftir, at sami tekstur var skrivaður á steinin á trimum málum. Talan var um skriftmálini: forngrikst, demotiskt og hieroglyffur.

Jean Francois Champollion

Málfrøðingar vístu steininum áhuga, og skjótt fekk hann navnið Rosettasteinurin.

Ein franskur málfrøðingur Jean Francois Champollion setti sær fyri at royna at týða tekstin á steininum.

Tvey tey fyrstu málini, forngrikst og demotiskt, vóru ikki torfør hjá Jean Francois at fáa greiði á. Tá tað var greitt fór hann undir hieroglyffurnar. Men tær vóru so mikið torførar at greiða, at ikki fyrr enn í 1822 kundi hann boða frá, at nú dugdi hann at lesa og skriva hieroglyffur.

Tá fór Jean Francois undir at skriva eina orðabók og eina grundbók, til tey, sum høvdu hug at læra málið. Hetta vakti ans og áhuga millum málfrøðingar í fleiri londum, og fleiri fóru nú at læra seg at lesa og skriva hieroglyffur.

Rosettasteinurin

Áhugin var sera stórur, og skjótt fór stórt tal av fólki undir at umseta tað, sum var varðveitt av ymsum slagi t.d. tað sum var skrivað á fleiri túsundára gamlar papyrusrullur.

Skjótt vóru tekstir funnir, sum greiddu frá fornu mentanini, trúarlívinum, nøvn og ættarbond hjá teimum, sum høvdu haft ræði í forna Egyptalandi.

Í dag kunnu vit takka hermanninum, sum í august 1799 fann Rosettasteinin, fyri at hann tók steinin við sær til Fraklands og takka Jean Francois Champollion fyri, at hann brúkti ein stóran part av lívi sínum til at læra seg og onnur at lesa tað, sum var skrivað við hieroglyffum í forna Egyptalandi.

Uttan hesar hendingar høvdu vit ikki kunna skrivað hesa grein um egyptiska søgu og mentan.

Kortini ikki myndamál

Egyptisku hieroglyffurnar vera vanliga settar í samband við myndir av djórum t.d. fugl, leyvur, neyt, krokudyllur og mong onnur djór.

handverkarin_30_2009.indd 25 2/9/09 15:02:53

Hetta skal kortini ikki skiljast soleiðis, at egyptiska skriftmálið er eitt myndamál sum t.d. kinesiska málið er.

Í hieroglyffunum eru tekn, sum svara til ávís ljóð í egyptiska málinum. Har eru eisini tekn, sum kunnu samanberast við okkara bókstavir. Umframt at hieroglyffurnar hava bókstavir, so hava tær eisini tekn fyri ávís stavilsi.

Málfrøðingar siga tí, at skriftmálið í prinsippinum ikki so nógv øðrvísi enn okkara skriftmál. Mest líkist tað modernaðum japanskum skriftmáli.

Tað vóru omanfyri 700 myndir í skriftmálinum, og teir skrivaðu frá høgru móti vinstru, ella loddrætt.

Hieroglyffur og rúnir

Hieroglyffurnar høvdu ein sera stóran átrúnaðarligan týdning, og høvdu eina funktión, sum kann samanberast við norrønar rúnir. Tað var ikki hvør sum helst, sum var førur fyri at lesa og rista rúnir, og tey sum dugdu kynstri, vóru hildin at duga gand, ella meira enn at mata seg. Hóskandi er her eisini at nevna orðafellið "Ramar risti hann rúnirnar". Í Føroyum kundi eisini vera talan um "raman gand". Nakað tað sama kann sigast um hieroglyffurnar í Egyptalandi.

Mett verður, at tað hevur verið ein rættuliga lítil partur av egyptiska fólkinum, sum dugdi kynstri at skriva og lesa Hieroglyffur. Tey kønastu vóru prestar og embætismenn.

Lat heldur okkum gera tað...

Húsavarðartænastan er altíð klár. Vit gera tímasáttmálar ella heildarloysnir til virkir og stovnar, har vit altíð eru til reiðar at gera umvælingar ella aðrar uppgávur – alt samdøgrið.

...húsavarðaarbeiði
...alt snikkara- og timburarbeiði
...umvælingar
...sethúsabygging

Tel 565589 - 565590
hvt@kallnet.fo, Fax 315590

Húsavarðartænastan

Ognað tær tín egna húsavørð

handverkarin_30_2009.indd 26 2/9/09 15:02:54

Tekniski Skúlin í Tórshavn

.... skapandi umhvørvi

Ein virkin og góður samstarvsfelagi

Ein skúli, ið gevur góða og samanhangandi undirvísing, í tøttum samstarvi við vinnu og lærling

- vit seta lærlingin í middepilin
- vit nøkta tørvin hjá vinnuni
- vit hava høgan námsfrøðiligan og fakligan førleika

Tekniski Skúlin í Tórshavn, Postrúm 3239, 110 Tórshavn .Tlf. 738050 . www.tst.fo . T-postur tst@skulin.fo

handverkarin_30_2009.indd 27 2/9/09 15:02:55

demich
hiti | vatn | sanitet

Grønar orkuloysnir frá Demich

Nú er nýggja hitapumpan hjá Mitsubishi komin til Føroyar!
Við einum COP á 5,33 og einum hitaevni á heili 6,3 KW

- Serligt tøkni frá Mitsubishi electric
- Hitakapasitet á 1,5 upp til 6,3 KW
- COP á 5,33
- Sera still bert 20 dB. (stillasta á marknaðinum)
- Driftssikkur við lágan temperatur
- I-See sensor. Hesin leiðir hitan har tørvur er
- Reina og sunna luft við Plasma Duo Filtur
- Orkusparandi avrímingartøkni
- Nýggjan serligan kompressara
- Umhvørvisvinarligan kølimiðal

Bert 15.900,-
v/ uppsetan

Demich P/F, Tórshavn
Postboks 378 - Stóðjagarta 2
Telefon +298 309 310
Fax + 298 309 311

Demich P/F, Vágur
Marknoyrarvegur 36
Telefon +298 373 535
Fax + 298 373 565

Demich P/F, Saltangará
Heiðavegur 80
Telefon +298 444 500
Fax + 298 445 501

demich@demich.fo • www.demich.fo

MITSUBISHI ELECTRIC
Changes for the Better

Tú ert handverkarin!

... og vit hava eitt spennandi arbeiðspláss til tín

Vit kunnu bjóða
- spennandi arbeiðsuppgávur
- ein fjølbroyttan og áhugaverdan gerandisdag
- starvsfólkamenning
- trivnað

Hevur hetta tín áhuga, ring so til okkara ella send okkum eitt teldubræv

SENDISTOVAN

LM ELECTRIC

Hoyvíksvegur 53 100 Tórshavn Tel 351220 Fax 351230 lm@lm.fo www.lm.fo

LM Electric bjóðar heildarveiting innan el-innlegging, ráðgeving og projektering
· El-innleggingar · Ljós og talvur · EDV-& telefonnet · Neyðstreymsskipanir (no-break og diesel)
· Trygdarskipanir (ABA, ITV, AIA og ADK) · Hvítvøruservice

Døgntænastan svarar altíð á tel 35 12 20

handverkarin_30_2009.indd 28 2/9/09 15:02:55

Nær er kommunala brennistøðin opin?

Skriva **rusk** í einum sms
og send til **28 50 00**

Tú fært svar beinanvegin!

Tórshavnar kommuna

Fá tær realkredittlán frá okkum og slepp undan at hugsa um rentuhækkingar

www.eik.fo

handverkarin_30_2009.indd 29 2/9/09 15:02:56

Ídnaðar- og garaguhurðar

Spyr fyrst hjá okkum: tlf. 31 99 92

Sp/f. Tórshavnar Maskinverkstaður

Vestara bryggja - Box 3135 - FO 110 Tórshavn

Battaríir Til Øll Endamál

Fartelfonir



Hoyri Apparatir

Ur og mangt annað

Eisini hava vit øll vanlig battaríir

Heil- og smásøla, landsins bestu battaríir, og landsins bestu prísir

PÓLAR

Akumulatorhandilin v/Margeir Ørvarsdal
Sigmundargøta 26 - 100 Tórshavn
tel. 31 83 47 - fax 31 83 67 - fartal. 21 28 60

elmek

v/Magnus Magnussen · Gripsvegur 18 · FO-100 Tórshavn
tel 317352 · far 217700 · elmek@post.olivant.fo

Alt el- og edvarbeiði verður gjørt skjótt og væl

handverkarin_30_2009.indd 30 2/9/09 15:02:57

Ring til okkara á 345 600 ella send okkum ein SMS til 1919 og skriva "ring" og vit ringja aftur til tín. Les meira á www.u-dagur.fo

Betri pensjón

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari

handverkarin_30_2009.indd 31 2/9/09 15:02:58

Flagsa á netinum

– har, og tá tú vilt

Við Flags kanst tú flagsa á netinum við tíni fartelefon. Tú kanst lesa og skriva teldupost, lesa tíðindi, vera á Facebook og msn og gera alt tað, tú vanliga ger á netinum. Vit bjóða serligar Flags-pakkar, sum ger tað uppaftur lættari og bíligari at vera á.

Bílegg Flagspakkar við at senda sms boð til 1441.
Fá meira at vita á www.ft.fo

SilvurFlags

Mánaðargjald: 50 kr.
Íroknað 15 Mb download hvønn mánað
Kostnaður eftir 15 Mb: kr. 5,00/Mb
Bílegg: Send "SilvurFlags" til 1441

GullFlags

Mánaðargjald: 150 kr.
Íroknað 100 Mb download hvønn mánað
Kostnaður eftir 100 Mb: kr. 3,00/Mb
Bílegg: Send "GullFlags" til 1441

facebook bwin myspace.com FLAGS

FØROYATELE